# Fuglfirðingar halda á

**ÍF hevur framvegis fult stigatal í aðru deild, eftir at teir um vikuskiftið fingu fult í Klaksvík**

2. DEILD
*Jákup Mørk*




Tað tykist sum um kappingin í aðru deild bara er ein dystur um at vinna næst fremsta plássið. Í øllum førum hava fuglfirðingar higartil sett seg so rimmar fast á fremsta sessin, og leygardagin gjørdist talan um fimta sigurin upp í slag.

Hesa ferð var mótstøðan í Klaksvík, og leingi sá kanska út til, at KÍ her skuldi geva fuglfirðingunum ein skarpan gang. Viggon Johannesen hevði annars lagt ÍF á odda undan steðginum, men tá Meinhard Hansen javnaði í seinna hálvleiki, stóð á gomlum nøglum hjá oddaliðnum. Ein av veteranunum á liðnum, Ken Bærendsen, sýndi tó, at hann framvegis er maður fyri at senda avgerandi bóltarnar inn, og við einsamalla málinum frá honum komu stigini við aftur tvørtur um Leirvíksfjørð.

Í kappingini eftir ÍF eru tað fyrst og fremst trý lið, sum dystast, og øll hesi vunnu sínar dystir um vikuskiftið.

Á Argjum varð framskundaður dystur leiktur fríggjakvøldið, tá B68 vitjaði, og her var ongan tíð nakar ivi um, hvat var betra liðið. Argjamenn tóku sær fyri tað nógva av løttum, og við eitt sindur størri nærlagni kundi sigurin verið væl størri enn tey trý málini, sum vóru á muni.

Tað kundi hann eisini verið á Tvøroyri, har eitt illa mannað B36 lið vitjaði. Einasti eykamaðurin á liðnum var venjarin, Dia Midjord, sum annars ikki hevur verið tað stóra á vøllinum seinastu nógvu árini, men tá ein av B36-leikarunum noyddist út við krampa, mátti Dia traðka til. Tað hjálpti tó lítið um hjá B36, sum mátti leggja rygg til sannførandi 4-0 tap. Hjá tvøramonnum hinvegin ein sigur, sum heldur teimum føstum uppi á øðrum plássi.

Seinasta liðið í bólkinum, sum eltir ÍF, er Sumba, og eisini teir vunnu tryggan sigur. Hesa ferð vitjaðu sumbingar í Leirvík, og tó at LÍF vanliga stendur seg væl heima, so var ikki tað stóra at gera. Bergur Djurhuus skeyt eitt mál hvørju megin steðgin, áðrenn pólverski Norbert Lusak at enda staðfesta sigurin.

Seinasti dysturin var í Vági, har B71 vitjaði. Sandoyingar hava í ár fyrst og fremst sett sær fyri at byggja eitt nýtt lið upp, og hetta hevur eisini speglast á stigatalvuni, har møguleikin fyri uppflyting mest sum er fokin longu. Í Vági vóru teir tó heilt væl við fyrstu trý korterini, men hóast møguleikar, so spurdist einki burturúr. Og so kundi VB seta trumf á eftir steðgin. Teir báðir veteranarnir, Per Joensen og Jón Pauli Olsen skutu eitt mál hvør, áðrenn Tummas Richard at enda staðfesti sigurin, sum av álvara sýndi, at VB ætlar sær nakað væl meira enn leiklutin sum botnlið í ár.

### Úrslit um vikuskiftið:

| | |
|---|---|
| AB-B68 | 4-1 (2-0) |
| KÍ-ÍF | 1-2 (0-1) |
| LÍF-Sumba | 0-3 (0-1) |
| TB-B36 | 4-0 (2-0) |
| VB-B71 | 3-0 (0-0) |

## Støðan, 2. deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 5 | 5 | - | 0 | - | 0 | 11 | 2 | 9 | 15 |
| 2 Sumba | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 13 | 3 | 10 | 10 |
| 3 AB | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 12 | 5 | 7 | 10 |
| 4 TB | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 10 |
| 5 VB | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 6 | 5 | 1 | 7 |
| 6 LÍF | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 5 | 13 | -8 | 6 |
| 7 KÍ | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 9 | 19 | -10 | 6 |
| 8 B36 | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 7 | 9 | -2 | 4 |
| 9 B71 | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 2 | 7 | -5 | 3 |
| 10 B68 | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 4 | 12 | -8 | 1 |

Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Eyðun Samuelsen | AB | 5 |
| Eirikur Joensen | Sumba | 5 |
| Kaj Roest | TB | 4 |
| Áki Mørk | B36 | 3 |
| Johnny Samuelsen | AB | 2 |
| Johan Dávur Højgaard | B68 | 2 |
| Hanus Eliasen | ÍF | 2 |
| Heini Heinason | ÍF | 2 |
| Høgni Zachariasen | ÍF | 2 |
| Bergur Djurhuus | Sumba | 2 |
| Allan Michelsen | TB | 2 |
| Allan Poulsen | TB | 2 |
| Dan Mortensen | TB | 2 |
| Rasmus Nolsøe | TB | 2 |
| Bergur Vinter | VB | 2 |
| Jón Pauli Olsen | VB | 2 |






# Súkklaðu 100 km á Eystanstevnu

**Ikki vóru tað nógvir, ið hattaðu sær undir langa túrin úr Havn, um Eiðisskarð til Runavíkar leygardagin. Men nakrir vóru, og í góðveðrinum leygardagin megnaðu teir fremstu at koyra teinin uppá bert trýggjar tímar. Gunnar Dahl-Olsen gjørdist vinnari**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*



*Gunnar Dahl Olsen vann súkklukappingina á eystanstevnu*

Vaksin og unglingar skuldu leygardagin út á ein rættiligan “marathon-túr”. Hetta tí, at føroysku súkklararnir nú leggja seinastu hondina á fyrireikingarnar til Oyggjaleikirnar, sum byrja síðst í hesum mánaðinum. Tí bleiv koyrt 100 km.

Byrjað varð við Statoilstøðina í Gundadali, og málið, varð við Statoilstøðina í Saltangará.

Leiðin gekk gjøgnum Kaldbakstunnilin, uppum Eiðisskarð, og so beina leið til Runavík. Men enn var ikki liðugt. Nú skuldi teinurin runt Agnið koyrast eisini, og so gekk leiðin á mál við Statoilstøðina.

Súkklararnir løgdu til brots klokkan níggju og longu á middegi vóru teir fremstu á mál. Tað var undan gjøgnum Sundalagið, og tí gekk ikki long tíð áðrenn menn vóru á veg, drúgva túrin niðan móti Eiðisskarð. Tað er ein tungur teinur, og tá eydnaðist tað Gunnar at sleppa frá hinum súkklarunum. Gunnar fekk eitt “hol” aftur til hinar, og hetta megnaði hann at halda líka á mál, hóast mótvind gjøgnum allan Skálafjørðin.

Eftir at tey vaksnu høvdu súkklað, skuldu børn kappast. Kappingin fór fram á keiøkinum í Runavík. Sera spennandi var at fylgja við. Kappast bleiv í trimum bólkum, bólkur I, II og III. Bólkur I eru gentur/dreingir frá 6 til 8 ár. Bólkur II 9 til 11 ár og bólkur III 12 til 14 ár.

Úrslit:

Bólkur I:

| Nr. | Navn | Felag/staður |
|---|---|---|
| 1 | Jógvan Mellemgaard | TSF |

Bólkur II:

| Nr. | Navn | Felag/staður |
|---|---|---|
| 1 | Finnur Mellemgaard | TSF |
| 2 | Niels Christiansen | TSF |
| 3 | Atli Carlsson | TSF |
| 4 | Helgi Lamhauge | Runavík |

Bólkur III:

| Nr. | Navn | Felag/staður |
|---|---|---|
| 1 | Torkil Weyhe | TSF |
| 2 | Rúni Bláfoss | TSF |
| 3 | Sigmund Olsson | TSF |
| 4 | Rani G. Jacobsen | TSF |
| 5 | Poul Andrias Ziska | TSF |

Unglingar:

| Nr. | Navn | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Hans Krosstein | 3.33,50 |
| 2 | Bergur Johansen | 3.33,55 |

Menn:

| Nr. | Navn | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Gunnar Dahl-Olsen | 3.01,21 |
| 2 | Sverri M. Edvinsson | 3.06,05 |
| 3 | Eli Christiansen | 3.09,22 |

# Talvið hesa vikuna

Malakhov,V (2672) - Nielsen, Peter H. (2625)
4th IECC Istanbul TUR (12), 12.06.2003

1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Ric3 Bb4 4.e3 (í nimzoindisku byrjanini eru fleiri møguleikar hjá hvítum í fjórða leiki, eitt nú Fc2, a3, Rif3 og Bg5 t.d.) 4...0—0 5.Rige2 d5 6.a3 Be7 7.cxd5 Rixd5 8.Bd2 Rid7 9.g3 Ri5f6 10.Bg2 e5 11.0—0 c6 12.Fc2 exd4 13.Rixd4 Rib6 14.Rad1 Bc5? (telduforritið Fritz 7 dámar einki hendan leik. Tað tykist eisini skeivt at býta handan bispin av, samstundis sum hvítur útviklar seg víðari) 15.Rie4 Bxd4 16.Bb4! Re8 17.Rxd4 Ribd5 18.Rid6! (hvítur dominerar fullkomiliga støðuna) 18...Re5 19.Ric4 Re8 20.Fc1 (sær út sum ein hugskotsleysur leikur, men nakað seinni síggja vit genialu ætlanina við frúgvaleikinum) 20...Fc7 21.Bd6 Fd7 22.e4 Rib6 23.Bc5 Fc7 24.Rid6 Rd8



DIAGRAM
Støðan eftir 24...Rd8

25.Rib5! cxb5 26.Ff4! og svartur gavst. Svarta frúgvin kann ikki verja rókin samstundis sum hon skal flytast 1—0

# Óvæntaður vinnari

**EM í Istanbul, sterkasta opna kapping nakrantíð, er av. Ein navnframur veteranur vann kappingina hjá monnunum, meðan ein svii bleiv evropameistari hjá kvinnunum**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Kappingin um fyrsta pláss varð sum væntað tøtt øll trettan umførini. Av teimum 207 luttakarum í bólkinum hjá monnunum, vórðu umleið fimtan telvarar sum heilt fram til næstseinasta umfar kundi vinna EM-heitið.

Tað varð tó ein sum skaraði framúr. Zurab Azmaiparashvili, 43, úr Georgia. Azmai er eingin ungur telvari og er tað tí sjáldsamt, at ein kann bróta seg upp til 2700 ratingmarkið somikið seint í talvkarrieruni. 9,5 stig av trettan møguligum stigum vann Asmai sær, sum eisini er formaður í Georgiska talvsambandinum, sær uttan nakað tap. Ein óvanliga góð skora í sterkastu opnu kapping nakrantíð.

Seint í kappingini vann Azmai við svarta fólkinum á sínum nærmasta kappingarneyta, Malakhov. Teir flestu í toppstríðnum vóru annars nøgdir við javnleik við svørtum, men maðurin úr Georgia vildi meira og savnaði allar kreftir til at vinna á unga russaranum.

Azmai bleiv stórmeistari sum 28 ára gamal, og er tað lutfalsliga seint. Til samanberingar kann nevnast, at Sergey Karjakin fyri umleið einum ári síðani bleiv yngsti stórmeistari í heiminum við sínum tá einans 12 árum.

Spennandi verður at fylgja Azmai, sum nú kanska fær møguleikan at sleppa í part saman við absoluttu elituni í teimum siðvondu sterku kappingunum, eitt nú Linares og Wijk aan Zee

### Toppurin:

| | | |
|---|---|---|
| Azmaiparashvili | (2678) | 9,5/13 |
| Malakhov | (2672) | 9,0 |
| Graf | (2630) | 9,0 |
| Ivanchuk | (2704) | 8,5 |
| + tíggju aðrir við | | 8,5 |

Hægst rataði telvarin í kappingini, Ivanchuk, legði varliga út við nógvum javnleikum og fáum sigrum. Hann tapti einki talv og endaði ovarliga við sigri í seinasta umfari, men eftir hansara støði at døma, varð úrslitið kortini heldur skuffandi. Grischuk (2702), sum luttók í 3rd Tórshavn International í 2000, endaði við átta stigum, sum eisini er eitt sindur undir væntaðu skoruna.

Sokolov bjargaði sær kappingina við góðum endaróðri, sum gav honum loksins tey magisku átta stigini. Tað merkir, at hann saman við umleið fjøruti øðrum, hava kvalifiserað seg til komandi HM. Nikolic, sum var í Føroyum um páskini og hjálpti klaksvíkingum undir FM, fekk somuleiðis átta stig og eina HM-billet.

Hjá kvinnunum vann stór meistarin úr Svøriki, Pia Cramling (2470), eftir umdyst við Cmilyte úr Litava. Hon var ein av favorittunum, og kann nú kalla seg besti kvinnuligi telvari í Evropa. Judit Polgar er sjálvsagt besta kvinna í heiminum við sínum 2715 ratingstigum. Hon telvar nú bert saman við monnunum. Í løtuni luttekur hon í einari sterkari kapping í Frankaríki.

### Bestu norðurlendingar

Peter Heine Nielsen, sum heilt fram til næstseinasta umfar lá heilt frammi í oddinum, bleiv í júst tí umfari niðurspældur av Malakhov, ið bert nýtti 25 leikir at berja niður tann annars trygga danan. Peter Heine leikti síðani ein skjótan javnleik í seinasta umfari fyri at tryggja sær HM-luttøku. Sum heild enn ein góð kapping hjá tí nærum tveir metur langa dananum. Sviin Agrest hevði eisini eina góða kapping við átta stigum, og verður hann saman við Peter Heina einastu norðurlendsku umboð í HM, sum verður seinni í árinum, ella tíðliga í komandi ár.